planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

# Mugu satsa uppá Prix Føroyar



**Fróði Vestergaard, fyrrverandi samskipari av Prix Føroyum sigur, at tíðin hevur víst, at føroyingar sakna Prix Føroyar**

X-Factor, Talent og Melodi Grand Prix. Nógvar útlendskar tónleikasendingar eru, og einaferð var eisini ein í Føroyum – Prix Føroyar.

Eftir sjey umfør bleiv Prix Føroyar í 2005 niðurlagt. Prix Føroyar, sum gekk sína sigursgongd um aldaskiftið bleiv tikið av aftur skránni, og íleggjarar mistu áhugan. Norðurlandahúsið, Kringvarp Føroyar og FUT vóru høvuðsíleggjarar til kappingina.

- Orsøkin til, at Prix Føroyar var niðurlagt var, at Kringvarpið vildi leggja sína orku í onnur mentunarlig tiltøk. Eitt nú tosaðu tey um sendingar og annað. Men eg dugi ikki at síggja, at nakað er komi síðani, sum kann sigast at verða á sama støði, sigur Fróði Vestergaard.

Prix Føroyar lat dyrnar upp fyri royndum sum óroyndum tónleikarum. Øll áhugaði kundi melda seg til, og tónleikaliga blómaði í Føroyar. Til seinasta umfar av Prix Føroyum var áhugin so stórur, at Norðurlandahúsið hevði heilar 30 útlendingar á vitjan.

Fløguframleiðarar, fyriskiparar av festivalum og útlendskir miðlar komu til Prix Føroyar, og nógvir av bólkunum fingu møguleika at royna seg uttanlands.

- Tónleikurin setti dagsskrá í Føroyum í Prix Føroyar árunum. Nú er einki sum kann samanberast við tað, sigur Fróði Vestergaard.

Spurdur um, hvør hann heldur Prix Føroyar skal aftur á dagsskrá, sigur Fróði soleiðis.

- Tíðin skuldi vísa um tað var saknur í Prix Føroyum. Tað haldi eg tað er, sigur hann.

# 2 milliónir hyggja at Lindu

**Tá luttakararnir fríggjakvøldið framførdu við Big Band hjá DR vóru 1.621 milliónir fólk, ið hugdu eftir sendingini**



Á donsku sjónvarpskanalini TV 2, var samstundis sendingin Den Store Klassefest, og har vóru bert 836.000 hyggjarar.

Tá avgerðin nærkaðist, og bert ein hálvur tími var eftir X-Factor, fóru fleiri av hyggjarunum frá TV 2 og yvir til DR.

1.972 milliónir fólk sóu Lucas og Mohamed í vandabólkinum. Ein dystur, sum Mohamed sum kunnugt vann.

Fríggjadagin er semifinalan har føroyska Linda, Alien Beat Club, Sidsel og Mohammed skulu dystast, og bert trý teirra koma víðari til finaluna.

Linda Andrews vitjaði sunnudagin í Miðlahúsinum, og har legði hon dent á, at tað ikki longur er spurningurin um hvør vinnur.

- Vit eru øll vinnarar nú, og tað er als eingin kapping millum okkum longur. Men sjálvsagt vil eg fegin gerast vinnarin av X-Factor, sigur hon.

### Linda hevur X-Factor

Ein atkvøðugreiðsla hevur verið á bt.dk síðan seinasta fríggjakvøld, har vitjandi kunnu siga sína hugsan um hvør av finalistunum í X-Factor hevði mest av tí sokallaða X-factorinum í seinasta umfari av kappingini.

- Eingin veit hvat X-Factor er, men vit vita øll tá tað er har, sigur Linda.

Á heimasíðuni hjá BT hava yvir 12.000 vitjandi verið og atkvøtt fyri hvør av finalistunum hevur mest av tí sokallaða X-factorinum.

Atkvøðugreiðslan var sett á stovn eftir seinasta umfar, og Linda er stórvinnari í hyggjarans eygum.

Linda framførdi tá kenda lagið hjá Duffy "Mercy", og mong eru tey sum halda, at hetta var ímillum bestu framførslur hjá Lindu nakrantíð.

**Linda – 59 prosent**
**Sidsel – 9 prosent**
**Alien Beat Club – 12 prosent**
**Mohammed – 7 prosent**